## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði við onkrum vátakava- ella kavaæli. Okkurt skifti upp í hvassan vind. Hósnáttina turt í veðrinum og vindurin minkar og lækkar niður í vestan. Hitin millum 1 og 3 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi. Skýggjað og regn ella vátakavi við hita millum 2 og 5 stig. Út á dagin slítur í, men møguliga okkurt vátaslettingsæli og vindurin veksur eitt skifti upp í skrið av norði og hitin fellur til umleið 1 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði. Vátakava- ella kavaælingur men eisini onkrir sólglottar. Út á dagin minkandi vindur. Hitin millum 1 og 3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Framvegis óstøðugt veður, men knapt so nógvur vindur. Sum frálíður økist hitin nakað.

# Emma metsølu

*Emma og hennara Blues Band hava selt 2000 fløgur í uppá umleið tríggjar vikur*

**Tað gongur valla ein dagur uttan vit hoyra »Babu«, »Tú ert mítt summar«, »Eg kenni Petur« ella onkran annan av sangunum á fløguni »Hetta er eisini mítt land« hjá M´as Blues Band. Babu er meir ella minni vorðin ein landaplága og hevur sangurin eisini vunnið sær fótafesti innan almenna føroyska hitlistan**



ÚTGÁVA
*Ingrid Bjarnastein*

Fyrsta uppleggið var uppá 1000 fløgur. Síðani varð fløgan enn einaferð endurprentað – enn eitt upplegg upp á 1000 fløgur. Og nú er fløgan aftur nærum útseld kring landið.

– Tað eru nakrar fáar fløgur sum eru úti á marknaðinum í løtuni, men fløgan er so gott sum útseld, fortelur Jòannes Jacobsen, sum staðið hevur á odda fyri fløguútgávuni.

Fløgan hevur verið á marknaðinum ógvuliga stutt. Hon kom út síðst í november og longu nú er triðja endurprentingin á 500 eintøk á veg.

– Sjálvandi eri eg ógvuliga glaður fyri hetta, sigur Jóannes Jacobsen.

– Tað er næstan so, at man verður rørdur. Fyrsta uppleggið ljóðaði jú 1000 fløgur, og hildu vit, at um vit kláraðu at selja tað, so var tað ógvuliga gott. Hetta er mestsum fantastiskt. Eftirspurningurin er framvegis stórur. Fleiri fólk hava ringt til mín og spurt eftir fløguni. So nú í vikuni koma 500 fløgur afturat, so øll sum ynskja tað kunnu ogna sær fløguna.

**Metsøla**

3´arin gevur fløguna út. Høgni Zachariassen frá 3´aranum veit so mikið at fortelja, at hetta er metsøla í ár. Ongin fløga hjá teimum hevur selt so nógv uppá so stutta tíð. Men var hetta ikki yvir allar væntanir?

– Bæði og, sigur Høgni Zachariassen.

– Vit vistu beinanvegin, at hon kundi selja væl. Babu er ein sangur sum øll kenna, og hetta er nóg mikið, at fólk festa seg við fløguna og keypa hana. Men hetta er heilt vist ikki av tilvild.

Tey, sum ynskja at ogna sær sangirnar hjá Emmu og hennara fólkum, skulu ikki bíða leingi afturat. Triðja uppleggið verður á marknaðinum aftur í vikuni, so øll kunnu fáa Emmu í jólagávu, sum ynskja tað.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷7 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | ÷2 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 5 |
| London | 4 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | ÷10 |
| Moskva | ÷11 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | ÷5 |
| Kiev | ÷8 |
| Bukarest | ÷7 |
| Paris | 0 |
| Madrid | 4 |
| Róm | 5 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 2 |
| Malta | 11 |
| Tunis | 10 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 6 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 32 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst yvir Føroyum og Skotlandi viknar og fer spakuliga suðureftir. Eitt lágtrýst norðan fyri Ísland fer móti Lofoten og dýpist og ein kuldabrúgv kemur framvið Føroyum norðaneftir mikunáttina.



Hósdagin tekur eitt lágtrýst seg upp yvir Grønlandsfjørðinum. Tað dýpist á veg suðureftir og fer framvið beint eystan fyri Føroyar. Sunnudagin kemur ein hitabrúgv framvið av útnyrðingi.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/12 kl. 06[00]– 18/12 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 5,5°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 17/12 kl. 06[00]– 18/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 55,1 mm


**Oyravernd**
v/ FM Radio
**Peltor**



**kr. 1.265,-**

**Fokus Electronic**
Reynstún 19 · Argir · Tlf. 311306


## VESTFALLSKYRRINDI

14. des.: Tendring
21. des.: Mánin longst frá jørðini
22. des.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. des | 10.03 | 22.26 | 09.03 | 21.26 | 09.18 | 21.41 | — | 12.03 | 00.40 | 13.03 | 08.18 | 20.41 | 07.18 | 19.41 | 10.18 | 22.41 | 11.18 | 23.41 | 09.48 | 22.11 | 11.03 | 23.26 |
| 20. des | 10.47 | 23.08 | 09.47 | 22.08 | 10.02 | 22.23 | 00.26 | 12.47 | 01.26 | 13.47 | 09.02 | 21.23 | 08.02 | 20.23 | 11.02 | 23.23 | — | 12.02 | 10.32 | 22.53 | 11.47 | — |
| 21. des | 11.28 | 23.48 | 10.28 | 22.48 | 10.43 | 23.03 | 01.08 | 13.28 | 02.08 | 14.28 | 09.43 | 22.03 | 08.43 | 21.03 | 11.43 | — | 00.23 | 12.43 | 11.13 | 23.33 | 00.08 | 12.28 |
| 22. des | — | 12.19 | 11.19 | 23.51 | 11.34 | — | 01.48 | 14.19 | 02.48 | 15.19 | 10.34 | 23.06 | 09.34 | 22.06 | 00.03 | 12.34 | 01.03 | 13.34 | — | 12.04 | 00.48 | 13.19 |

5 707265 100036 >